## Færri norðmenn trúgva uppá Gud

Seinastu 18 árini er parturin av trúgvandi lækkaður við 10 prosentstigum. Í 1991 søgdu 78 prosent av norðmonnum at teir trúðu uppá Gud. Í dag er talið lækkað niður í 68 prosent, vísir ein kanning sum Stiftelsen Kirkeforskning hevur latið gera. Norska blaðið Vårt Land skrivar, at millum tey 18-24 ára gomlu sigur fjórði hvør seg vera ikki-trúgvandi. Ein orsøk til hetta kann vera, at fleiri fara undir hægri lestur og at fleiri fólk flyta til stórbýirnar.



## Amerikanarar skifta trúgv

Nú er staðfest, at fólkið í USA eru stórbrúkarar av religión og skifta ofta trúgv. Henda flytingin er oftað orsakað av, at hin einstaki følir ikki at andaligi tørvurin verður nøktaður ella bara ynskir eina aðra trúgv. Fyrr varð ofta hildið, at filisofiskar ósemjur lógu sum grund fyri hesi flytingini, men nú er staðfest at so er ikki. Kanningin er gjørd sum ein eftirfylgjari av eini kanning í fjør, har omanfyri 2800 fólk tóku lut, og er ein serlig lýsing av fyrrverandi katolikkum, protestantum og annars øðrum, sum skifta millum teirr ymisku trúarrætningarnar. Granskararnir meta, at millum 47 og 59 prosent skifta trúgv eina ferð í lívinum, og er hetta hægri enn áður mett. Ein triðingur hevur skift trúgv tríggjar ella fleiri ferðir.

# Mordarin Nicky kemur til Føroyar

**Tað er ikki hissini vitjan sum føroyingar fáa seinni í ár. Talan er um tann 70 ára gamla fyrrverandi bandaleiðaran, Nicky Cruz úr USA. "Hann er ætlaður til fongsul, til eletriska stólin ella til helviti", søgdu fólk um hann fyri 50 árum síðani. Í dag boðar hann gleðiboðskapin um Jesus kring allan heimin**

ÁTRÚNAÐUR

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*- Ein dagin segði mamma mín við meg: "Nicky, eg elski teg ikki. Tú ert ikki longur sonur mín. Far burtur frá ásjón míni!" Í dag er nógv broytt í lívinum hjá familjuni Cruz - Nicky er vorðin frelstur. Tað sama eru flestu av systkjum hansara - og mamman og pápin*

*David greiddi Nicky frá um gleðiboðskapin, og at tað var hóast alt ein ið elskaði hann fram um alt. Orðini um at Gud elskaði hann nú og altíð vildi gera tað, fullu ikki í góða jørð hjá hatska bandaleiðaranum. - Eg var so illur við David, at eg hótti við at drepa hann, hevur Nicky síðani greitt frá*

**Leirvík:** Hóast liggjandi góðveðrið seinastu tíðina, hava fleiri ungfólk í Leirvík eisini havt ein ávísan mann og eitt ávíst tiltak at hugsa um í øllum hitanum: Leygardagin 24. og sunnudagin 25. oktober í ár.

Navnið er Nicky Cruz, sum í síni tíð livdi eitt hart lív á gøtuni sum bandaleiðari í New York og við øllum tí, sum tað førdi við sær. Soleiðis var tað einaferð, men soleiðis er tað ikki longur!

Spennandi søgan um Nicky Cruz er longu kend um stóran part av tí kristna heiminum, tí hann er nógv brúktur sum talari í samkomum og aðrastaðni. Eitt av teimum støðunum, sum hann enn hevur til góðar at vitja er okkara land. Men nú kemur hann altso til Føroyar - longu í ár.

Tað hevur nevniliga eydnast ungfólki úr kristna umhvørvinum í Leirvík og leirvíkingi í útlegd at fáa henda vælkenda mann við teirri serstøku søguni til Føroyar.

Tey ungu fólkini eru komin væl ávegis við teimum praktisku og andaligu fyrireikingunum til hesa stórfingnu vitjanina í oktober. Ætlanin er at henda vitjanin skal spyrjast, samstundis sum menniskju skulu fáa eyguni upp fyri, hvussu Gud kann broyta eitt mannalív fullkomuliga.

- Søga hansara er bæði spennandi, ótrúlig og góð. Og tí ynskja vit, at føroyingar eisini fáa høvið at hoyra hana, siga tveir av fyrireikarunum, teir báðir leirvíkingarnir Jørgin Andreasen og Hans Fróði Hansen, sum í løtuni er búsitandi í USA. Tað er eisini hann, sum hevur fingið sambandið við Nicky Cruz.

### Eitt lív á gøtuni

Tað eru helst mong sum hava lisið søguna um Nicky Cruz, ið heilt frá barnaárum av føldi seg óynsktan í sínum egna heimi í Puerto Rico og ikki minst í hesum heimi.

Foreldrini, ið hoyrdu til eina familju ið dýrkaði Satan og misbrúktu hann av tí allar ringasta: Pápin hevði fyri at læsa hann inni í dúgvuhúsinum, meðan mamman bart út segði, at hon ikki ynskti hann.

Út frá hesum fekk hann eina sera vánaliga byrjan uppá lívið, og hetta endaði við at hann rýmdi og flutti inn hjá beiggjanum sum búði í New York. Men sárini frá barnaárunum við honum allan vegin.

Nicky byrjaði eitt lív á gøtuni, og kom við í ein av bandunum, sum tá herjaðu í býnum - Mau Mau, her hann stutt eftir gjørdist leiðari. Hevði bandin ringt orð á sær frammanundan, so gjørdist tað ikki betir eftir at hann gjørdist leiðari.

Soleiðis gekk gerandisdagur hansara, og soleiðis hevði tað uttan iva gjørt í mong ár aftrat, um hann ikki hevði hitt ein serstakan mann á gøtuni ein dag. Hetta var David Wilkerson, sum í kristna heiminum er kendur víða hvar sum prædikumaður.

Henda hendingin fekk avgerandi ávirkan á restina av lívinum hjá bandaleiðaranum Nicky Cruz.

### Drep prædikumannin

Hesin David Wilkerson hevði fingið eitt kall um at virka millum gøtubandar í New York. Og tað gekk hvørki verri ella betri, enn at teir báðir hittust ein dag - bandaleiðarin við tí ringa umdøminum og tann stillføri prædikumaðurin við tí góða boðskapinum.

David greiddi Nicky frá um gleðiboðskapin, og at tað var hóast alt ein ið elskaði hann fram um alt. Orðini um at Gud elskaði hann nú og altíð vildi gera tað, fullu ikki í góða jørð hjá hatska bandaleiðaranum.

- Eg var so illur við David, at eg hótti við at drepa hann, hevur Nicky seinni greitt frá. Men henda hóttanin helt kortini ikki Davidi aftur í arbeiði sínum.

Hann gjørdi ikki mætari enn at taka eitt stig aftrat, og fara beinleiðis inn á høvuðsskrivstovuna hjá Mau Maubandanum. Her endurtók hann boðskap sín, hóast Nicky stóð frammanfyri honum við knýttum neva, klárur at langa honum ein frammaná og kanska drepa hann.

David lat bara standa til: Hann stóð har og brosaði, samstundis sum hann bað fyri Nicky. Tvær vikur seinni skipaði David fyri eini møtirøð í grannalagnum, og her avgjørdi Nicky at fara fyri at lurta eftir prædikumanninum.

### Aftur á gøtuna

Tað gekk ikki øðrvísi enn so, enn at Nicky og fleiri limir úr hansara banda vórðu frelstir á hesum møtum. Dagin eftir fóru teir allir sum ein á ta lokalu politistøðina fyri at lata inn aftur vápn, knívar og aðra útgerð sum teir høvdu brúkt í bandakríggjunum.

Nicky Cruz fór aftur í skúla, byrjaði at lesa í Bibliuni og hevur síðani virkað sum prædikumaður og fyrilestrarhaldari kring allan heimin. Hann gloymdi kortini ikki vinir sínar á gøtuni, men vendi aftur til teirra, og helt áfram at boða teimum um Ein sum elskaði teir framvegis. Hetta arbeiðið hevur eisini fingið avgerandi týdning fyri teir nú fyrrverandi bandalimir.

Nicky Cruz hevur eisini skrivað fleiri bøkur, og komandi ár kemur ein filmur út um lív hansara. Filmurin er kallaður upp eftir teirri einu bókini "Run Baby Run".

Áðrenn tað fáa so føroyingar høvið at hoyra hann live, tá hann í oktober mánaði kemur higar at siga frá lívi sínum, umvending síni og hvussu Gud hevur verið við honum nú hann er farin um tey 70!




*Nicky Cruz hevur skrivað fleiri bøkur, og fleiri bøkur eru skrivaðar um hann. Komandi ár kemur ein filmur út um lív hansara*

## Nicky Cruz

| | |
|---|---|
| **Føddur:** | 6. desember 1938 í San Juan, Puerto Rico |
| **Søga:** | Fyrrverandi bandaleiðari og mordari í New York. Virkar nú sum prædikumaður kring allan heimin |
| **Nú:** | Kemur til Føroyar í oktober mánaði |
| **Tilfar:** | Hevur skrivað fleiri bøkur og í 2010 kemur filmur út um hann. Trailari frá filminum sæst á hesum linki: http://www.runbabyrunmovie.com/. |